FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 17. oktober 2019

J.Nr.: 19/00349

Svar upp á fyrispurning nr. 4/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Tordi J. Niclassen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálaum, um fráfaringaraldur á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kann roknast við, at landsstýrismaðurin broytir galdandi mannagongd um fráfaringaraldur á almanna arbeiðsmarknaðinum og fremur nýggjar ásetingar hesum viðvíkjandi.

Svar:
Samgongan hevur sett sær sum mál at virka fyri at gera tað møguligt hjá tí einstaka starvsfólkinum at vera so leingi á arbeiðsmarknaðinum sum gjørligt.

Tað krevur nakað av fyrireiking at broyta galdandi regulverk. Eg kanni í løtuni møguleikarnar at broyta rundskriv um fráfaringaraldur hjá alment settum. Í rundskrivinum er ásett bæði fráfaringaraldur, og hvussu leingi avtala kann gerast um longda starvstíð.

Verður rundskrivið broytt, er eisini neyðugt at broyta fráfaringaraldurin hjá tænastumonnum. Arbeitt verður tí í løtuni eisini við einum uppskoti til hvussu tænastumannalógin kann broytast.

Miða verður ímóti at fremja broytingar um fráfaringaraldur á almenna arbeiðsmarknaðinum sum skjótast.

Leggjast kann afturat, at møguleikin fyri at vera longri á arbeiðsmarknaðinum hóskar væl til reglurnar í eftirlønarlógini um at starvsfólk, sum velja framhaldandi at arbeiða eftir at tey eru vorðin 67 ár, kunna útseta sína fólkapensjón, og harvið fáa hægri fólkapensjón tá tey fara av arbeiðsmarknaðinum.

Tinganes, 17. oktober 2019

Jørgen Niclasen

Landsstýrismaður í fíggjarmálum